FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 18. februar 2020
J. nr.: 20/00061-2

Svar uppá spurning nr. 52/2019 eftir § 52a í tingskipanini

Spurningur frá Jóhannis Joensen, løgtingsmanni, settur Jørgen Niclasen, landsstýrismanni í fíggjarmálum, um kommunala útjavning.

Spurningurin er soljóðandi:

1. Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at seta í verk kommunala útjavningarskipan?
2. Um so er, ætlar landsstýrismaðurin at skipa eina kommunala útjavningarskipan eftir serføroyskum viðurskiftum?
3. Heldur landsstýrismaðurin, at ávísar treytir eiga at fylgja við eini kommunalari útjavningarskipan?

Svar:
Verandi lóggáva hevur longu dømi um skipanir, ið javna millum kommunur. Eitt nú var skattalógin í 1997 broytt soleiðis, at m.a. peningastovnar, tryggingarfyritøkur, telesamskiftis-fyritøkur og oljusølufyritøkur býta skattin millum tær einstøku kommunurnar í mun til fólkatalið í kommununum. Sambært ásetingunum um skatt til atvinnukommunur, skulu fyritøkur, ið hava virksemi í fleiri kommunum, eisini rinda skatt til allar hesar kommunur.

Eitt annað dømi stavar frá 2014, tá ið eldraøkið varð lagt út til kommunurnar. Tá varð samtykt, at skattur av eftirlønarinngjøldum skuldi lutast kommununum eftir tali av borgarum, ið vóru 67 ár ella eldri, og ikki eftir, hvar eftirlønaruppspararin búði. Samstundis var ein serskipan gjørd fyri kommunurnar í Sandoyar sýslu, ið gav teimum nakað meira enn øðrum kommunum.

Nevnast kann eisini, at tann munur í kommunalu inntøkunum, ið kemur av at løgtingið hevur samtykt serskipanir fyri DIS, FAS og annað, verður javnaður við at endurrinda kommunum skatt, ið tær missa av hesum ávum.

Í løtuni eru ikki ætlanir um at seta aðra kommunala javningarskipan í verk, men í framtíðar lóggávu eigur støðan hjá ymsu kommununum sjálvsagt at verða umhugsað. Vit eiga tó altíð at tryggja kapping millum kommunur, eisini um skattgjaldarar, og tí eigur høvuðsábyrgdin fyri inntøku hjá kommununum at liggja hjá teimum sjálvum.

Tinganes, 18. februar 2020

Jørgen Niclasen
Landsstýrismaður í fíggjarmálum